betri banki

# Umsitingarfráboðan

*(oyðublað til verjumál í umsiting - arvur)*

*Sambært lóg skal góðkend umsitingardeild umsita ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju.*
*Í hesum sambandi skal umsitingardeildin í Betri Banka hava hesa umsitingarfráboðan.*
*Um tær tørvar hjálp, er ein vegleiðing á seinastu síðu í hesum skjali ella seta teg í samband við Umsitingardeildina í Betri Banka.*

## 1. Slag av verjumáli

- ☐ Ómyndigur, undir 18 ár
- ☐ Vanligt verjumál, frátikin fríggjarliga virkisføri, smb. § 5 í verjumálslógini
- ☐ Verjumáli við frátøku av løgræði, smb. § 6 í verjumálslógini

## 2. Upplýsingar um kontueigara

**2.1 Kontueigari er:**

| | | |
|---|---|---|
| Fult navn | P-tal | Telefon |
| Bústaður | Postnummar | Bygd/Býur |

## 3. Upplýsingar um verja/verjar

**3.1 Verji er/verjar eru:**

- ☐ Foreldramyndugleikahavi
- ☐ Tilnevndur verji (er verji tilnevndur, skal verjutilnevning leggjast við)

**Verji 1**

| | | |
|---|---|---|
| Fult navn | P-tal | Telefon |
| Bústaður | Postnummar | Bygd/Býur |

**Verji 2**

| | | |
|---|---|---|
| Fult navn | P-tal | Telefon |
| Bústaður | Postnummar | Bygd/Býur |

## 4. Hvaðani stavar ognin:

## 5. Stødd og samanseting av ogn

| | Tøkur peningur *(kr.)* | Virðisbrøv *(kr.)* | Saldo á láni *(kr.)* |
|---|---|---|---|
| Áljóðandi virði | | | |

## 6. Skal verji hava útgoldið rentu og vinningsbýti?

☐ Ja ☐ Nei

Um, ja:

| Peningastovnur | Skrásetingar- og kontunummar |
|---|---|
| | |

## 7. Fær kontuhavari pensjón?

☐ Ja ☐ Nei

## 8. Arvur

*Skal bert fyllast út, um kundin, ið er arvingur, er undir 18 ár ella tað er ásett í testamenti, at arvurin er bundin. Bústjóri kann fylla út (sí vegleiðing á síðu 4).*

### 8.1 Er arvurin bundin?

☐ Ja ☐ Nei

| | |
|---|---|
| Um ja, hvussu leingi: | |
| Navn arvaleggjarans: | |
| Bústaður arvaleggjarans og dato, tá arvaleggjari andaðist: | |
| Hvussu er búgvið uppgjørt (alment skifti, § 75-skifti, serogn): | |
| Í hvønn mun er ognin tvingsilsarvur: (skal bert fyllast út, um testamentið ásetur treytir fyri umsiting av bundna arvinum, sí vegleiðing á síðu 6). | |
| Eru serligar treytir í testamenti ella gávubrævi (t.d. um serogn)? | |

## 9. Skjøl at leggja við

Samleikaprógv skal latast inn fyri kunda og verja, um talan er um nýggjar kundar í bankanum.

Verji skal lata inn verjutilnevning.

Viðkomandi skjøl at lata inn, um talan er um arv:

**Slag av skjali**

Testamenti

Búuppgerð

Gávubræv

Onnur skjalprógv

____________________

Dagfesting

| | |
|---|---|
| ____________________ | ____________________ |
| Undirskrift hjá verja | Undirskrift hjá verja |

betri banki

# Vegleiðing

## Foreldur, ið er verji/verjar

Tað er ikki neyðugt at senda skjalprógv inn fyri at prógva, at foreldrini hjá tí ómyndiga eru verjar. Stendur bara annað av foreldrunum nevnt at vera verji, eigur orsøkin til tað at vera nevnd. Verður nevnt í fráboðanini, at bara annað av foreldrunum, sambært avtalu ella dómi hevur foreldramyndugleikan, og soleiðis einsamalt verji, eigur skjalið við avtaluni ella dóminum at verða sent við. Er annað av foreldrunum deytt, eigur skiftirættarváttan ella annað prógv fyri andlátið at verða lagt við.

## Slag av verjumáli

Familjufyristiginin kann seta í verk verjumál fyri ein persón.

### Vanligt verjumál

Verjumál kann vera vanligt, smb. §5 í verjumálslógini. Treytin er at persónurin hevur sinnisjúku, ringa demenssjúku, sárliarligt menningartarn ella hava álvarsliga vikaða heilsustøðu. Hetta hevur við sær at viðkomandi ikki er før/ur fyri at taka avgerðir. Eitt verjumál skal tillagast tørvinum hjá viðkomandi sum kemur undir verju og má ikki vera meiri víðfevnt enn neyðugt. Verjumálið kann tí verða avmarkað til at umfata fíggjarlig viðurskifti, herímillum ávísar ognir ella viðurskifti, men kann eisini verða avmarkað til at umfata persónlig viðurskifti.

### Verjumál við frátøku av løgræði

Frátøka av løgræði, smb. § 6 í verjumálslógini, kann koma afturat einum vanligum fíggjarligum verjumáli, um tað er neyðugt at forða fyri, at viðkomandi setur ogn, inntøku ella onnur fíggjarlig áhugamál í vanda, sum kann skerja viðkomandi munandi, ella at forða fyri fíggjarligari misnýtslu.
Persónur, hvørs løgræði er frátikið, er ómyndugur og kann tí ikki gera fíggjarligar avtalur, sum eru bindandi uttan so, at annað er avgjørt. Persónurin hevur heldur ikki valrætt til løgtings- og fólkatingsval.

## Nær skal ogn umsitast í eini umsitingardeild?

### 75.000 kr. ella hægri

Tað eru bara ognir, sum eru 75.000 kr. ella hægri, ið skulu umsitast í umsitingardeildini. Ognir undir 75.000 kr. umsitur verjin hjá tí ómynduga.

### Ogn undir 75.000 kr.

Ogn, sum er minni enn 75.000 kr., skal umsitast í eini umsitingar-deild, um umsitingardeildin frammanundan umsitur ogn, ella um tað verður roknað við, at ognin seinni fer upp um 75.000 kr. Um ognin fer undir 75.000 kr., og tað ikki kann roknast við, at ognin aftur gerst 75.000 kr. ella hægri, letur umsitingardeildin verjanum ognina eftir áheitan frá verjanum.

## Hvaðani stavar ognin

Tað skal upplýsast hvaðani ognin stavar.
*Dømi 1:* Tryggingarpeningur frá vanlukkutrygging. Bundin til barnið er 18 ár.
*Dømi 2:* Vanlig uppsparing og almannaveiting.

## Stødd og samanseting av ogn

Tað skal upplýsast virðið á ognini, sum verður løgd í umsitingardeildina, undir hesum hvussu nógv av virðinum liggur í tøkum peningi, virðisbrøvum og/ella saldo á láni.

## Skal verji hava útgoldið rentu og vinningsbýti

Tað er møguligt, at annar enn tann undir verju fær útgoldið rentur og vinningsbýti. Skal verjin hava hetta útgoldið, skal peningastovnur, skrásetingar- og kontunummar upplýsast.

## Búuppgerð (Skiftihættir)

Tað eru ymiskir mátar, eitt búgv kann gerast upp:

- Privat skifti/heimaskifti: Eitt búgv kann ikki verða latið til privat skifti, um ein arvingur er undir 18 ár ella undir verju.
  Alment skifti: Alment skifti kann nýtast, tá ein av arvingunum er undir 18 ár ella undir verju.
- § 75-skifti: Um ein arvingur er undir 18 ár ella undir verjumáli, kann búgvið ikki verða viðgjørt sum vanligt heimaskifti. Undir
- ávísum treytum loyvir § 75 í skiftilógini eitt serligt skifti, sum líkist heimaskiftinum. Fyri at búgvið kann viðgerast sum eitt § 75-skifti, skulu ávísar treytir verða loknar.

## Hvørji eru tvingsilsarvingar?

Tvingsilsarvingar eru hjúnafelagi og lívsarvingar. Lívsarvingar eru egin og ættleidd børn, barnabørn o.s.fr. (eftirkomarar). Helvtin av arvalutinum, sum hjúnafelagi og lívsarvingar verður tillutaður, er tvingsilsarvur.

## Bundin ogn og tvingsilsarvur

Bundin tvingsilsarvur skal umsitast í eini umsitingardeild. Arvleggjari kann við testamenti áseta, at arvurin er bundin, so arvingurin ikki hevur møguleika at ráða yvir ognini innan fyri eina ávísa tíðarfreist ella so leingi, arvingurin er á lívi. Arvingurin hevur í hesum førum einans rætt til at fáa rentur útgoldnar. Um arvleggjari hevur valt at binda arvin uttan at áseta eina tíðarfreist, kann arvingurin krevja at fáa arvin útgoldnan, um hann prógvar seg føran fyri at ráða yvir arvinum sjálvur. Bundni arvurin kann tó ikki setast úr gildi, áðrenn arvingurin er fyltur 25 ár. Harumframt kann Familjufyrisitingin loyva, at bundni arvurin verður frígivin, tá mett verður, at tað er til vælferð fyri arvingin.

## Bundin fríarvur

Fríarvur kann á sama hátt verða bundin so leingi, sum avgjørt er í testamenti. Fríarvurin kann verða umsitin í eini umsitingardeild. Meginreglan er, at bundin fríarvur skal umsitast á sama hátt, sum bundin tvingsilsarvur (tvs. í eini umsitingardeild). Frávik kunnu tó gerast við testamenti, har avgjørt verður, at bundni fríarvurin verður bundin á annan hátt (t.d. í aðrari umsitingardeild ella í fastari ogn). Verjin hjá tí ómynduga ger av hvør umsitingardeild skal umsita ognina. Tó er hetta ikki galdandi, um tað í testamenti ella við gávubrævi er avgjørt, at ognin skal umsitast í eini ávísari umsitingardeild. Hevur ein arvaleggjari ella ein gávugevari tikið slíka avgerð, kann verjin einans krevja at fáa ognina flutta í aðra umsitingardeild, um Familjufyrisitingin játtar hesum.

Bundin arvur er serogn uttan so, at annað er ásett við testamenti.

Um tað verður ásett við testamenti, at bundni arvurin skal gjaldast út eitt ávíst tíðarskeið, ella tá serligar umstøður gera seg galdandi, syrgir umsitingardeildin fyri, at bundni arvurin verður útgoldin. Um útgjaldingin er treytað av eini meting, um treytirnar í testamentinum eru loknar, kann bert útgjaldast eftir avgerð frá Landsstýrinum ella frá tí, sum er heimilaður til tess.